# So stendur sjónvarpssendarin fyri tørni

**Sjónvarpssendarin á Húsareyni er farin væl um pensiónsaldur. Hann hevur longu verið í brúki longri, enn mælt verður til, og kann sløkna nær sum helst**

SENDINETIÐ
*Edvard Joensen*

Sjónvarpssendarin á Húsareyni livir eina »kummerlia« tilveru. Hann er gamal og hevur avgjørt sæð sínar bestu dagar. Hann er farin væl um tann aldur, sum mett varð, at hann fór at klára. So tað er í grundini bara ein spurningur um tíð, til hann ikki orkar meira, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, sum umsitir sendinetið.

Andras Róin sigur, at Føroya Tele hevur søkt um stórar upphæddir til sendinetið, men einki er komið burturúr.



*Sjónvarpssendarin á Húsareyni er farin væl um pensiónsaldur og kann ganga fyri nær sum helst. Føroya Tele hevur víst á støðuna og biðið um pengar at seta ein nýggjan sendara upp fyri, men hevur ikki fingið neyðugu játtanina*

Nú vil landsstýrismaðurin ganga ígjøgnum alt økið, sigur Andras Róin. Men tað gongur nakað seint, heldur hann.

Landsstyrismaðurin setti í 2002 eina nevnd at kanna sendineti, men hon er ikki liðug enn. Men sambært grágreiðingini, sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, lat løgmanni í vikuni, væntar hann at nevndin fer at koma til eina niðurstøðu og handa landsstýrismanninum eitt tilmæli í hesum mánanum.

Ímeðan eldist sjónvarpssendarin alt meira, og hann verður ikki betri fyri hesa tíðina. Føroya Tele hevur ongar pengar til eykalutir. Og eykalutir kunnu gerast torførir at fáa, tí sendarin er gamal.

Tað stendur í grundini púra einki til við sendinetinum yvirhøvur, skilst á fólki, sum hava skil fyri slíkum. Sjónvarpssendarin á Húsareyni er høvuðssendarin, sum sendir signalið frá sjónvarpshúsinum í Vørðsluni í Havn víðari til sendararnar kring landið. Fer hann, eru tað bara nøkur fá hús í Havn, ið klára at taka signalið í Vørðsluni, sum fara at síggja Sjónvarp Føroya.

Og teir ymsu sendararnir kring landið, streika eisini soleiðis av og á. Sum dømi nevnir Andras Róin, at ein av grundunum til støðuna, sum nú er, við at eingin millumbylgjusendari er, var tann, at penganrir, sum sendirørið skuldi keypast fyri, vórðu brúktir til sjónvarpssendaran á Hestinum oman fyri Sumba.

Hesin sendarin gekk fyri, og penagar vóru ikki til at fáa nýggjan. Men pengar vóru tøkir til grannan, sendirørið í Akrabyrgi. Føroya Tele valdi so at taka kjansin og brúka pengarnar til at fáa sjónvarpssendaran virknan aftur og so vóna, at millumbylgjusendarin hóraði undan, til pengar aftur vóru tøkir. Men tað eydnaðist, sum øllum kunnugt, ikki.

Hendan keðiliga støðan er ikki íkomin, tí vit ikki hava gjørt okkara skyldu, sigur Andras Róin. Vit hava staðiliga víst á, hvussu vánalig støðan er, og hava biðið um teir pengar, sum neyðugir eru fyri at fáa sendinetið at rigga. Men vit hava ikki fingið teir.-

## Bjóðar sær at keypa nýggjan millumbylgjusendara



*Petur Jacobsen, stjóri á Rás2 sigur seg kunna fáa fatur á einum framkomnum millumbylgjusendara fyri væl minni kostnað, enn nevndur hevur verið í samband við sendaran í Akrabyrgi*

**Stjórin á Rás2, Petur Jacobsen, bjóðar sær í brævi til Vinnumálaráðið at keypa ein nýggja millumbylgjusendara og seta hann upp á loranstøðini á Eiði**

BYLGJULONGD
*Edvard Joensen*

Rás2 ynskir at koma á bylgjulongd við Vinnumálaráðið. Til tess vil stjórin sleppa at keypa ein millumbylgjusendara, sum hann bjóðar sær at seta upp á loranstøðini á Eiði.

Petur Jacobsen, stjóri á Rás2 bjóðar sær til at keypa, seta upp og umsita ein 200 KW millumbylgjusendara, sum Útvarp Føroya so kann fáa fyrsta prioritet til at leiga sær senditíð á.

Petur Jacobsen sigur í brævinum til vinnumálaráðið, at hann kann fáa ein millumbylgjusendara fyri einar fýra - fimm milliónir krónur, sum er væl bíligari, enn tað, áður hevur verið nevnt, at ein slíkur kostar.

Talan er um sendara við nýggjari teknologi, sum er nógv tryggari í rakstri, enn tað nú so nógv umrødda sendirørið í Akrabyrgi, sigur stjórin á Rás2.

Hann mælir til at seta nýggja sendaran upp á loranstøðini á Eiði. Støðin fer at gevast at senda nakað skjótt, og har eru frammanundan bæði hús og sendimastur, sum ivaleyst hevði fingist hendur á.

# Útróðrarbátarnir nýta sjónvarpsantennu

*Millum mongu antennurnar umborð á Fiskivarða er eisini ein sjónvarsantenna, sum gjørdist bjarging teirra í neyðini, nú millumbylgjusendarin hjá Útvarpinum legðist fyri*
*Mynd: Skipalistin*




**Útróðrarbátar á innaru leiðunum hava loyst trupulleikan við sløkta millumbylgjusendaranum við at binda í eina sjónvarpsantennu**

HOYRILÍKINDI
*Edvard Joensen*

Gamalt er, at sjómaðurin er ongantíð ráðaleysur. Og nú hava teir funnið út av, at tað ber til at hoyra Útvarpið og Rás2 á landleiðini, hóast millumbygljusendarin er sløktur, og FM sendarin hjá Útvarpinum ikki røkkur. Tað klára teir við eini sjónvarpsantennu

Fróði Ejdesgaard, skipari á Fiskivarða úr Oyndarfirði, sigur, at teir hava loyst trupulkeikan við Útvarpinum við at binda í sjónvarpsantennuna, teir hava umborð. Tað ger, at teir hoyra bæði Útvarp Føroya og Rás2 líka væl, sum teir gera, tá teir eru við hús.

Sjónvarpssendarin er væl sterkari enn millumbylgjusendarin hjá Útvarpinum, og tað er eingin trupulleiki at hoyra hann út á einar 12 fjórðingar í øllum førum, sigur Fróði Ejdesgaard. So hjá teimum við teimum smærru bátunum, sum liggja á innaru leiðunum, hevur hetta, at millumbylgjusendarin slóknaði, nú í grundini bara verið ein fyrimunur, sigur hann.

Hann var annars rættiliga argur um at missa Útvarpið, tá sendarin fór, men sigur nú, at tað er nógv »behagiligari« at lurta eftir FM enn eftir millumbylgjuni, og nú, teir hava funnið út av hesum við sjónvarpsantennuni, hoyra teir knappliga eisini Rás2.

Men verri stendur til hjá teimum, sum eru longri burtur, sigur Fróði Ejdesgaard. Har hjálpir eingin sjónvarpsantenna. Tí er alneyðugt at fáa millumbylgjusendaran at virka aftur, staðfestir hann.